

*Í neðra eru pool borð og fótbóltsspæl. Eisini er orkesturútgerð og sjónvarp við nógvum rásum.*



*Skíggjar hava stóran týdning fyri nútímans ungdómsmentan. Ungdómshúsið hevur eina góða multimedia teldu, tvær vanligar teldur og Play Station 3*

verkstað við seymiútgerð, so sum seymimaskinu, overlockara og bindimaskinu.

- Vit fara eisini at tekna og mála, og satsa upp á at fáa eitt skeið við listakvinnuni Aggi Asgeirsdóttir, sum hevur Skapandi Spírar í Vági.

Men tað, sum upptekur tey ungu allarmest er tónleikur. Tí hava tey eisini keypt byrjunarútgerð til eitt orkestur, og hetta er sjálvandi sera vælumtókt.

### Tvær freistandi hæddir

Ungdómshúsið er innrættað í tveimum hæddum, við tveimum stórum hølum. Í neðra ber til at venja tónleik, spæla fótbóltsspæl og pool ella at liggja og sleingjast í sofuni og hyggja í sjónvarp. Har er eisini ætlanin at hava eina lítla kafé hvønn dag, við onkrum løttum til matna. Hóast øll drekka sodavatn hendan serliga dagin, vit eru á vitjan, so ætla tey at hava ein tilvitaðan kostpolitikk, har til ber at keypa sær okkurt gott aftaná skúlatíð. Til dømis smooties, bollar ella sandwich.

- Men vit fara ikki at bjóða góðgæti ella sodavatn, sigur Anna.

### Samstarv við hini

Fýra ungdómshús eru í landinum, og fleiri eru á veg. Í Klaksvík, Vestmanna, í Havn og nú eisini á Tvøroyri.

- Vit hava longu prátað nógv saman, og meiningin er, at vit leiðarar skulu hittast av og á og samstarva um ymiskt. Eisini kunnu tey ungu vitja hvønn annan, læra at kennast og skapa okkurt saman, sigur Anna Mortensen.

Í ungdómshúsinum á Tvøroyri hava tey sjálvandi eisini nakrar reglur, sum øll skulu halda seg til.

- Vit hava fingið íblástur til reglugerðina úr Klaksvík. Bæði um atburð og um nýtsluna av ymsu tilboðunum, sigur Anna Mortensen. Í ringasta føri kunnu fólk verða burturvíst, um tey ikki halda reglugerðina.

- Men tað skal heldur ikki vera ein sunnudagsskúli, sigur hon at enda.

## Reglugerð fyri Pakkhús 4

**Vit hava virðing fyri hvør øðrum**
**Vit eru góð við hvønn annan**
**Vit hjálpa hvør øðrum**
**Vit siga okkara meining**
**Vit lata ting hjá øðrum fáa frið**
**Vit rudda upp eftir okkum**
**Vit roykja ikki**
**Vit nýta ikki rúsevni**




# Goymslu- og handilslærlingur á Skipasmiðjuni

Hevur tú hug at koma í goymslu- og handilslæru á Tórshavnar Skipasmiðju?

Vit ynskja, at tú hevur miðnámsútbúgving og at tú:

- Ert opin og hevur lætt við at samskifta
- Hevur góðan teldu- og talførleika
- Ert framfýsin og ágrýtin

Harumframt er tað neyðugt, at tú hevur áhuga fyri mekaniskum og el-lutum.

Í lærutíðini fert tú at starvast á teimum ymisku goymslunum hjá fyritøkuni.

Góður møguleiki er fyri føstum starvi eftir loknað útbúgving.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

Tórshavnar Skipasmiðju P/F
Postboks 65
FO-110 Tórshavn

Att.: Hans Jacob Poulsen

í seinasta lagi 16. juni 2008.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, kanst tú venda tær til Boga Kirke á telefon 30 11 11 ella 79 11 11 ella við telduposti til bogi.kirke@faroeyard.fo.

SKIPASMIÐJAN

Tórshavnar Skipasmiðja
J.C. Svabosgøta 31
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@faroeyard.fo
www.faroeyard.fo